Tíðindir uttaneftir

Vilja hava stórt skip sjálvir

Í Grampian, Aberdeen-økinunm, royna teir nú eftir fígging til at byggja skip líkt tí gamla, kenda »Scottish Maid«

ABERDEEN 19. jan. (Diml.)

Grampian fer kanska at nýta útivið £3 miljónir, t.e. um 25-30 miljónir krónur, at luttaka í Cutty Sark Kappingini í 1997 – um so er, at ætlanin dregur fíggjarligan stuðul at sær.

Sjálvboðin hava sett á stovn ein grunn, sum eitur North-east Scotland Sailing Trust, og vóna at kunna geva ungdóminum høvi til at menna seg á havinum.



Model av »Scottish Maid« á siglingarsavninum í Aberdeen – Aberdeen Maritime Museum

Ætlanin

Tær £2.8 miljónirnar, vónað verður at fáa til vega, skulu nýtast til at byggja eitt stórt skip, grundað á ta 92 fót longu »Scottish Maid«, sum várð bygd í Aberdeen hjá Alexander Hall and Sons í 1839.

Hugskotið til ætlanina kveiktist, tá ið fjøld av seglskipum vitjaði í Aberdeen í 1991. Hetta var í sambandi við stóra altjóðaliga seglskipastevnu.

Formaður grunsins, Mike Dixon, segði í gjár: »Tað var hópur av fólki, sum var ikki sørt vónsvikin av, at so nógv skip av hesum slagnum komu ymsa staðni úr Europa og heiminum, men vit áttu einki, vit kundu kalla okkara egna.«

Og hann helt fram: »Tí var tað, at vit skipaðu ein arbeiðsbólk at arbeiða við málinum og gera ætlanina til veruleika. Vit her um leiðir hava sum kunnugt eina serstaka traditión í sigling og skipasmíði.«

Mike Dixon - stigtakari

Scottish Maid

Um ein nýggj »Scottish Maid« verður bygd, so kundi hon siglt á odda fyri seglskipa skrúðsiglingini, tá ið kappingin hjá teimum stóru skipunum verður aftur um trý ár.

16 venjingarfelagsskapir í sigling eru í Bretlandi; men eingin teirra heldur til her á leið. Sjálvt »Malcolm Miller«, sum nógv meta vera stóra skipið hjá Aberdeen, vitjar sjáldan býin, hóast tað varð bygt her.

Møguleikar

Í gjár legði arbeiðsbólkurin við Mike Dixon á odda eina ætlan tiltakinum viðvíkjandi fyri eina serstaka nevnd hjá býráðnum í Aberdeen, har borgarstjórin Jim Wyness er formaður.

Teir fegnaðust um ætlanina um at byggja slíkt stásiligt far, men vildu ikki binda býráðið peningaliga fyrr enn teir høvdu hitt aðrar áhugaðar stovnar á máli. Her verður hugsað um landspartaráðið, Grampian Region Council, bygda- og býráð í økinum, fyritøkur her um leiðir og siglingarfelagsskapin Sail Training Association.

Wyness borgarstjóri segði kortini, at hugskotið var stórbært, men enn vóru onkur mál at greiða, áðrenn ætlanin kann verða sett í verk. **jt.**

Skipari á oljutanga-skipi fyri atfinningum

Skiparin á tangaskipinum »Braer«, sum fórst í ódnarveðri í Hetlandi 4. januar í fjør, Alexandros Gelis, ákærdur fyri gáloysni

ABERDEEN 21. jan. (Diml.)

Í eini almennari frágreiðing, sum kom í gjár, verður millum annað sagt, at skiparin á oljutangaskipinum við Hetland sýndi »álvarslig brot á skyldur sínar,« og at hetta var atvoldin til vanlukkuna. Tangaskipið »Braer« fór á land, og stór umhvørvislig vanlukka kundi staðist av hesum.

Ábyrgdarloysi

Hin 46 ára gamli skiparin Alexandros Gelis gjørdi einki til tess at tryggja ella læsa fyri stálrørum, sum høvdu skrætt seg leys í ódnarveðrinum á tí liberiskt skrásetta tangaskipinum 4. januar 1993.

Rørini ella leiðingarnar skaddu luftrørini, sum so sjógvur slapp ígjøgnum. Sjógvur kom í eykatangarnar og dálkaði goymslurnar av dieselolju.

Alexandros Gelis skipari

Hetta hevði við sær, at bæði høvuðsmaskinan og generatorurin gingu fyri, og manningin mátti rýma av skipinum sunnan fyri Hetland. Øll 84.700 tonsini av ráolju lóku út, so eitt ovurstórt reinsingartiltak mátti verða sett í verk; hetta arbeiðið kostaði millum £2 milj. og £2.5 milj., t.e. góðar 20 miljónir krónur.

»Braer« aftan á vanlukkuna

Illa frágingið

Hetta, at skiparin ikki fekk stálrørini í rættlag, var sambært frágreiðingini eitt »álvarsligt brot á skyldur skiparans at varðveita trygdina og sjógóðskuna á skipi sínum og trygd manningarinnar,« varð kunngjørt á deildini fyri kanningum siglingarvanlukkum viðvíkjandi, Department of Transport's Marine Accidents Investigation Branch, í Aberdeen í gjár.

Eisini nemur frágreiðingin við, at hetlendska bjargingartænastan sveik, tá ið hon ikki beinan vegin og við allari orku og útgerð fór til hjálpar, tá ið skiparin á »Braer« bað um sleip. Lagt verður tó afturat, at eingin sleipibátur hevði verið førur fyri at komið til oljutangaskipið, áðrenn manningin var farin í bátarnar.

Frágreiðingin leggur annars dent á, at bjargingartænastan ikki hevði fingið greiða heimild at skipa so fyri, at sloppist kundi undan, at oljutangaskipið fór á land; hinvegin, verður lagt aftrat, er einki, sum bendir á, at hetta kundi verið ein atvoldin til vanlukkuna. **jt.**

Politiskar viðmerkingar

Latið grátin og tannagríslini støðga, tá sorgin er fullkomin

Hesin navnframi og kendi kinverjin Kung-Fu-Tse hevur megnað mong orð til sín dag, eisini orðatøk og glósur, ið vit enn kunna gera nýtslu av. Í sama viðfangi vil eg takka mínum lærumeistara í søguvísindini Annfinni í Skála fyri tey mergjaðu orð, sum í síðstuni eru søgd, um samfelagið, sum í seinastuni hevur verið at lisið í bløðunum. Eg eri samdur við søgumannínum í tí mesta, ið sagt hevur verið, so tað verða bert fáar viðmerkingar, ið frá mínari síðu koma aftur at hvat tí samfelagsliga svansinum viðvíkjur. Eg skal bert endurtaka tað, sum eg havi framført, í sambandi við at danska nevndin var í Føroyum, nevniliga tær tríggjar høvuðsorsøkirnar til, at okkara land misti sítt virði sum tjóð: **Lokalpolitikkur, politiskt dugnaloysi og Nepotisma (vina- og kenningarpolitikkur).**

Lokalpolitikkur

Tit, ið landinum hava stýrt, hava, um tit nokta tað til tíðarinnar enda, miðvíst arbeitt fyri: **1.** Fyri tað fyrsta at verða afturvaldir, **2.** at hjúkla um egna heimstøðið og umhvørvið, **3.** og við tí vitan, at tit eru vælkomnir í umhvørvið, har tykkara veljarar og næstrafólk halda til, til dagliga. Tað merkir, at tit hava latið tá samfelagsligu stoðuna koma í fjørða, fimta og kanska sætta lagi. Hetta er eitt faktum, og nøvn, sum tían verri, koma at fáa eitt sjáldsamt sorgarbundið skoðsmál í tí komandi søguskrivingini, koma seinni í hesi grein. At nevna hvørt avrik, tit politikarar hava gjørt í hvørjum valdømi sær, er ov rúgvismikið, men eftir upplýsingum frá teimum vitandi stovnunum, tosa vit um umleið 4 milliardir, ikki 4 milliónir, í berum valagni og svínaskapi. Hvat so annað er, sum enn ikki hevur sæð dagsins ljós, kunnu vit vanligu borgarar bert gita um, men kenni eg moralin rætt, so eru kettur í skýmaskoti, ið beiskar finna mús til matna.

Tað politiska dugnaloysi

Nú verður tosað hvønn dag um, hvat vit gjørdu skeivt ella rætt. Henda diskussiónin er fullkomiliga burturvið, tí vit øll vita hvat galið varð, og hvat galið varð gjørt. Sjálvandi visti tann danska stjórnin av svansinum, men sum vera man, eisini danskir politikarar og embætismenn eru tengdir so ella so at tí danska vinnulívinum, og skulu sum slíkir ansa sær. Hetta er serstakliga, tá tað snýr seg um føroysk viðurskifti, galdandi fyri Den Danske Bank. Vit eru fleiri sum ikki ivast í, og sum halda okkum kenna til innanhýsissamrøðurnar millum donsku stjórnina og DDB. Spurningurin er bert, eru hesar samtalur suspektar, ella vanligt túnatos. Eg persónliga meti, og eri stórliga bangin fyri, at hetta túnatosið fekk avleiðingar, sum hava svínabundið tann vanliga føroyingin, í eina so langa tíð frameftir, sum sjálvt vit nýggju í føroyskum politikki hava trupulleikar við at finna út av. Men sjálvandi skal loysnin finnast, og tað verða tit nyggju, ið loysnina finna. Eg ákæri tykkum, Atla P. Dam og Jógvan S. fyri ta fyrstu vanlukkuna. Ofyrireikaðir (tá meini eg reint professiónelt) fyri fyrsta skræðlið, harnæst í februar, sjálvt um tað var onnur leiðsla, og tær báðar næstu ferðirnar eisini. Allan vegin í gjøgnum óprofessiónelt, so tað baskar. Vit tosa ikki her um eina ella tvær ella tríggjar milliardir, men um, í fyrsta lagi 6.130.000.000 og seinni 8 ella 10. Tit hava fyrr sagt alment um tykkara embætisfólk, at tit hava ringar, vánaligar, ella at tit í hvussu so er ikki hava tikið tykkara ráðgevarar uppá ráð. Faktum er, at tit hava ráðgevarar í høgum klassa, men teir gera tíverri altið tað, teir eru bidnir um, og binda um heilan fingur. (Ein hevur tó megnað at loyst tungubandið, og søgan eigur stóra virðing fyri Hera Mohr). Alt endar í tí niðurstaðu, at tit, fyrst omanfyri nevndu, so harnæst tit næstu, hava bert økt kreppuna fyri okkara neyðars borgarar, okkara eldru, familjufólk við sethúsum, at stoðan nú er vorðin so ótolandi, at nú mugu aðrir bollar í pottin. Og tit, sum nevna tykkum politikarar, skuldu verið útbúnir politikarar, kalla tykkum sjálvar politikarar, og vegna verandi demokratisku skipanina eru politikarar. Tit vóru okkara álit, og hvat skulu vit, sum søgumenn geva tykkum sum eftirmæli: At tit roundu at gera tykkara besta, men tað var bara ikki gott nokk, ella hvat? Tí, skulu tit miriliga bukka í virðing fyri tí føroyska fólkinum og biðja pent um fyrigeving, og forfjóna tykkum (une sortie excellant) úr øllum politiskum arbeiði, eg ivist tó ikki eina løtu í, at tit eru til reiðar at geva ráð um ymiskar stoður, sum koma undan bræði í komandi tíðum, sum ger tað neyðugt, at heitt verður á tykkum um tykkara viðmerkingar. Tá fer søgan at minnast tykkum við virðing, tó við fáfongd fyri gerðir, men við virðing fyri sjálvsábyrgd og sjálvsviðurkenning av tykkara egnu gerðum.

Nepotisman (vina- og kenningarpolitikkurin)

Her skal ikki nýtast nógv pláss til hetta, men rætt skal vera rætt, at tað er ringt at koma uttan um vinir og kenningar og tann vina- og kenningarpolitikk, sum er førdur í Føroyum tey síðstu árini. Samantvinningin í fíggjarnevnd og fiskivinnunevnd, um vegagerðir mótvegis alliloyvum, tunnils- og havnagerðir mótvegis fiskiloyvum (svartkjaftatrolarum etc.) er kanska ein skrøna. Men tit sum á maktini sita vita heilt nágreiniliga hvat fór fram, og hvat fer fram. Vit høvdu brúk fyri 45 alibrúkum og smoltstoðum, vit fingu 95. Vit høvdu ikki brúk fyri stóri fiskiskipum (her verður fyrst og fremst hugsað um svartkjaftatrælvintýrið hjá Atla, og so sjálvandi skjótar inntøkur hjá samfelagsins sjakalum), enn tey vit høvdu, einans meira nútímans. Hvat gjørdu tit, góvu loyvir til vinir, næstringar, systkinabørn o.s.v. **Lata tit alla ábyrgdina til meklarar og sakførarar, tí teir í sínum lagi vóru smartir?? Nei, sannleikin botnar framvegis í tykkara ódugnaskapi, vina- og kenningarpolitikki.** Hørð orð í nýggja árinum, men –. Men tían verri so sonn, so sonn. Tíbetur eru tað fleiri enn tít, sum vita hvat fór fram. Og hví ikki seta nøvn á, á røttum stað.

Eg eri spurður um fyrr, um tað er okkara embætisfjøld, sum er heilt burturvið. Í flestu førum er tað sjálvandi ikki so, tí okkara embætisfólk fáa bert boð frá politikarunum, um hvat og hvussu tað skal gerast, og ein og hvør roynir eftir førimuni at fylgja sínum arbeiðsgevara. Tó er tað framvegis ein sannroynd, at vit hava nógv vælútbúgvið fólk, sum landið sær út í løtuni, skulu verða sera takksamir fyri, ið ikki hætta sær heim aftur og hava høgt mett størv í donskum og altjóða fyritøkum. Tey meta, at tey ikki fáa eina objektiva viðurkenning av sínum evnum. Í seinastuni hava vit tó sæð, at fleiri hava evnað at fingið starv, so vónandi kann hetta broytast í framtíðini.

Hetta eru bonsk orð í harðari tíð, men tey mugu og skulu kortini sigast. Tit sum við valdinum hava sitið, hava fyri tað mesta sorlað tann arv, vit fingu frá okkara hart og erligt arbeiðandi forfedrum. Aftaná teirra drúgva stríð, hava tit við egnum, **»Kanska Vinningi«** (og eg meini kanska, tá eg onki prógv havi fyri slíkum) lokalpolitiskum, og væl gjøgnumførdum vina- og kenningarpolitikki sorlað virðir og moral, sum okkara eldru virðismeta so høgt, í ein slíkan mun, at tað tekur ár áðrenn nøkur virðing fyri nøkrum kemur aftur í hæddina. Beiskir bitar í svangari tíð, men sigast skal tað kortini, Jógvan, Pauli E., Atli, Sven Åge, Olaf, John úr Skopun, Jógvan A. Ja, tíverri, tit vita hvørjar syndirnar eru, og tit vita, eins væl og flestu Føroya fólk vita, hvat tit hava gjørt, men hvussu nógv veit fólkið. Vit eru nógv, ið meta, at tað hevði verið stak áhugavert, um tit sjálvir tordu at greiða Føroya fólki frá, hví so var. **Ella eru tað onnur, ið skulu gera tað fyri tykkum?**

Roynið, eftir bestu evnum, kanska at greina bert nakrar av nógvum spurningum:

Hví flytur fólkið av landinum?

Hví kunnu abbar og ommur ikki hava síni nærmastu heima á jólum?

Hví skal man ræðast at hyggja upp á aðrar tjóðir?

Hví nívir ræðslan í hvørjum manni ella kvinnu, ið nærkast einum banka?

Hví spyrja børnini. Nær skulu vit flyta, og hvønn skúla skal eg nú í?

Hví tekur hasin maðurin møblarnar frá okkum?

Soleiðis kundu vit hildið fram at spurt hví, men tit politikarar og embætisfólk á teimum sosialu stoðunum vita, hvat **hví** merkir.

So kundi tað eisini verið hóskandi á hesum stað at spurt nøkur orð, kanska býtt, kanska rættvís: **Ætla tit at halda áfram sum leiðslumenn í samfelagnum, ella ætla tit at viðurkenna, at alt ikki gekk sum prestur prædikaði. Ætla tit at stinga niður posan og forfjóna tykkum úr tí politiska livinum, ella ætla tit at halda áfram at sorla okkara framtíð, ikki bert okkara núlivandi, men eisini hjá okkara børnum og hjá okkara barnabørnum.**

Okkara virðing fyri tykkum veksur fyri hvønn dag, ið tit viðurkenna tykkara væl ætlaðu og gjøgnumførdu oyðilegging av okkara samfelag, skjótari tit gera tað, tess skjótari koma vit víðari. Loysnirnar eru fleiri, men verða viðgjørdar í eini aðrari grein í næstum. Her eru tó nøkur av evnunum, ið koma at verða viðgjørd:

1. Føroya sum eitt valdømi.
2. 13-17 løgtingsfólk.
3. Løgtingsfólk skulu bert hava til arbeiðis at ambæta landinum.
4. Full ábyrgd fyri allar gerðir, ið hava við samfelagið at gera.
5. Fólk, ið hava ella royna at nýta landsins lógir til persónligan fyrimun, kunnu ikki góðtakast sum fólksins umboð.
6. Hvørt valfelag sær má kenna sær ábyrgd og hegni til, at umboðið er sambærligt við áðurnevndu krøv.
7. Nevnd, ið skal setast at seta øll hægri størv í Føroyum.
8. Bruttoskattaskipan, og útrudding av skattaspekulatión.
9. Javnvág á fíggjarlógunum.
10. Niðurskurður av almenna sektorinum. (Hetta kann gerast uttan stóri arbeiðsloysi, og vil eg eisini seinni greina hetta út).
11. Møgulig kvota/handilsbýti og innliman í størri handilseindir.
12. Eitt minkandi skattatrýst. (Hetta skal eisini útgreinast seinni).
13. Bjarging av flestu sethúsaeigarum, HER OG NÚ; kann eisini lata seg gera.
14. Burtur við undanførslum, og øðrum sum hevur við lumping ella snýta hvønn annan at gera.
15. Til síðst men ikki minst, hvør og ein av okkum øllum má gera sær greitt, hvønn lut ið viðkomandi ætlar at hava í tí nýggja landinum Føroyar.

Eg byrjaði við tí kenda kinverjanum Kung-Fu-Tse og meti tí, at tað er rættast at enda á sama hátt. Vit eru nógv, ið vilja samfelagnum væl, og eru framvegis nógv sum elska okkara land, og hetta er sagt av einum føroyingi, men ikki minst av einum sambandsmanni, ið fult og fast trýr uppá ríkisfelagsskapin. Uttan ríkisfelagsskapin høvdu vit riðið niðarlaga við Júkagarðar fram.

Eg vóni, at vit frameftir kunna fáa eitt úrslitagevandi kjak á glið, uttan hatur og slatur, men um tað eru ting og sakir, ið hava rættaruppgerðir fyri neyðini, so verður tað ein prísur, ið skal takast. Eg eri vísur í, at vit í okkara flokki, Sambandsflokkinum, eru før fyri at taka tey tøk, sum eru neyðug, tí um tað er nakar, sum kann rætta skútuna á lívskós aftur, so er tað vit. Tí meti eg eisini okkara innanhýsis diskussión sum eina ta týdningarmestu stigtøku, ið takast skal, eisini í nærmastu framtíð. Okkara fólk eru eisini, tíverri, ein partur av svansinum.

Tíbetur eru vit enn nøkur, ið trúliga trúgva uppá tað land, ið givið varð av okkara forfedrum. Tit omanfyrinevndu hava, saman við smartum monnum, revisorum, sakførarum og øðrum sokallaðum vinnulívsgarpum, S.Á.E., O.O. etc., niðurbrotið tann møguleika, ið kundi havt verið Norðuratlantshavsins perla, og so sanniliga eisini lívstornið við heimsins enda; tí vil eg fyribils enda við vísmansins orðum: men »hvis **MASSERNE** har mistillid til et menneske, må hans forhold undersøges. Hvis **MASSERNE** er begejstrede for et menneske, må hans folhold også undersøges.«

Kristin Vestergaard.